# Noyðir kommunurnar at samstarva

**Verður málið um eitt valdømi ikki avgreitt nú, er stórur vandi fyri, at tað doyr út eftir valgið.**
**– Tí skal tingið avgreiða tað sum skjótast, heldur Hallbera West, stjórnmálafrøðingur**

VALSKIPAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hallbera West er stjórnmálafrøðingur við sergrein í demokrati og medborgaraskapi.

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgmanni um at senda spurningin um eitt valdømi til fólkaatkvøðu?

- Okkum tørvar avgjørt broytingar í verandi valskipan. Ikki minst tá um ræður kvinnuumboðan, umframt at alt ov nógv lokalpolitisk atlit verða tikin við verandi skipan. Politikkurin snýr seg ikki um, hvat gagnar Føroyum sum heild, og við lokalpolitiska spælinum eru alt ov nógvar politiskar avgerðir, sum bert snúgva seg um asfalt og betong, sigur Hallbera West.

Sostatt metir stjórnmálafrøðingurin, at samanumtikið er talan um eina neyðuga broyting. Men hon leggur tó áherðslu á, at fyritreytin fyri einum valdømi er at kommunurnar verða skipaðar í størri og sterkari eindir.

- Vónandi kann uppskotið um eitt valdømi skunda undir tilgongdina at fáa kommunurnar at standa meira saman, so vit fáa størri javnvág í. Hendan tilgongd hevur tikið alt ov langa tíð, so vónandi kunnu ætlanirnar um eitt valdømi noyða tær at samstarva, sigur hon.

### Nú er at smíða

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgtingsformanninum um Føroyar sum eitt valdømi?

- Málið eigur ikki at verða sent út til fólkaatkvøðu, heldur Hallbera West. Hetta grundgevur hon við, at talan er um ein prinsipiellan spurning, sum er knýttir at nógvum kenslum, og at tað er at snúgva sær undan ábyrgdini at senda tað út til fólkaatkvøðu.

- Nú letur til at vit endiliga hava meiriluti fyri einum valdømi í tinginum. Verður bíða til eftir valgið, er stórur vandi fyri at kjakið doyr út. So nú er at arbeiða skjótt og fáa málið avgreitt beinanvegin, meðan møguleikin er til staðar, sigur Hallbera West, at enda.



*Sterkar kommunalar eindir eru treytin fyri einum valdømi. Vónandi kann uppskotið noyða kommunurnar at standa meira saman, sigur Hallbera West, stjórnmálafrøðingur.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Tvey løgting samtykkja nýggja valskipan

**Tað er løgið, at hetta er komið so seint í valskeiðnum.**
**- Hví ikki gera tað tíðliga í valskeiðnum og til dømis fáa tvey løgting at samtykkja tað, sigur Dennis Holm, samfelagsfrøðingur**

VALSKIPAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Dennis Holm er samfelagsfrøðingur og leiðari á Granskingardeplinum fyri økismenning

- Hvat heldur tú um uppskot-ið hjá løgmanni um at senda spurningin um eitt valdømi til fólkaatkvøðu?

- Eg eri samdur við nøkrum av tí, sum longu hevur verið frammi. Fyri tað fyrsta er tað eitt sindur at renna undan ábyrgd hjá po-litikarunum. Fyri tað næsta er spurningurin, hvat eitt sovorðið valstríð førir við sær, sigur Dennis Holm og nevnir, at t.d. í Norðoyggjum hava vit longu sæð tað, ið kann líkjast átøkum ímóti at skipa Føroyar sum eitt valdømi. Tí heldur hann, at vit kunnu vænta, at valdømi verður sett upp ímóti valdømi.

- Jú, eg eri eitt sindur skeptisk-ur, sigur Dennis Holm.



*Dennis Holm heldur, at hóast vit fáa eitt valdømi, so slepst neyvan undan lokalpolitikki, tí lokalpolitikkur fer altíð at verða førdur. Eisini í miðstaðarøkinum, heldur hann.*

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgtingsformanninum um Føroyar sum eitt valdømi?

- Tað er løgið, at hetta er komið so seint í valskeiðnum. Hví ikki gera hetta tíðliga í valskeiðnum og til dømis fáa tvey løgting at samtykkja hetta, sigur Dennis Holm. Hann minnir tó á, at hóast vit fáa eitt valdømi, so slepst tó neyvan undan lokalpolitikki, tí lokalpolitikkur fer altíð at verða førdur. Eisini í miðstaðarøkinum, heldur hann.

### Sum at broyta fóltbóltsreglurnar

- Eg eri ikki ósamdur við, at nøkur skeiv ting eru við núverandi skipan, men spurningurin er, hvussu rætt tað er við einum valdømi, sigur samfelagsfrøð-ingurin og leggur dent á, at vit eiga at vera tilvitað um um tær forskjótingarnar, ið henda maktjávnvágini, sum hann málber seg, um landið verður eitt valdømi.

- M.a. verða tað fólk, sum eru mest gearað til fjølmiðlarnar, ið sleppa framt, sigur Dennis Holm og vísir á, at hesi møguliga mest eru at finna í miðstaðarøkinum.

- Kjakið er berættigað, men timingin er vánalig. Hetta er, sum um vit tríggjar vikur áðrenn fótbóltslandskappingin byrjar, avgera at strika fríspark ella innkast, sigur Dennis Holm og sipar til, at valfeløgini og flokkarnir neyvan so stutt fyri val eru fyrireikað til Føroyar sum eitt valdømi.

- Hetta luktar eitt sindur av, at man ikki torir fyri fólkinum, sigur Dennis Holm.

# Ikki skapa fordømi

**Um hetta málið er ov óbehagiligt at viðgera og verður sent út til fólkaatkvøðu, kann tað skapa óheppið fordømi, sigur Heini í Skorini, sum lesur stjórnmálafrøði**

VALSKIPAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Heini í Skorini lesur stjórnmálafrøði.

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgmanni um at senda spurningin um eitt valdømi til fólkaatkvøðu?

- Í prinsippinum er einki galið við at hava fólkaatkvøðu, tí hetta er beinleiðis demokrati. Men tá vit hava umboðandi demokrati, mugu vit brúka tað av-markað, tí hetta kann misbrúkast, so tær ópopuleru avgerðirnar verða sendar út til fólkaatkvøðu, sigur Heini í Skorini, ið metir spurningin um eitt valdømi verða ov kontroversielt at senda út til fólkaatkvøðu.

- Um hetta málið er ov óbehagiligt at viðgera og verður sent út til fólkaatkvøðu, kann tað skapa fordømi. Hetta málið hóskar ikki til fólkaatkvøður.

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgtingsformanninum um Føroyar sum eitt valdømi?

- Eg haldi absolutt, at vit skulu hava eitt valdømi, tí tað er einasti máti at fáa politikararnir at fyrihalda seg til at alt landið, sigur Heini í Skorini.

- T.d. kundi tað ónda mynstrið verið brotið og tann lokala spekulatiónin kundi verið fyribyrgd.

- Tá lokalpolitisk fyrilit skulu ráða, har landspolitisk fyrilit áttu at rátt, er tað altíð óheppið. Í dag nýtist ein politikari ikki at hugsa um ein íløga er ábyrgdarfull landspolitisk.

### Styrkja eindirnar

- Tann møguligi mismunurin, sum útjaðarin kann vera fyri, kann kompenserast við at leggja fleiri øki út til kommunurnar og gera sterkari eindir. Eg eri ikki avvísandi fyri útjaðarapolitikki, sigur Heini í Skorini.

Hann er sum nevnt ikki ímóti at gera Føroyar til eitt valdømi, men metir ikki, at løtan er tann rætta.

- Timingin er vánalig, tí uppstillingarfundir eru longu byrjaðir, og tí skal tíð til eina eina so grundleggjandi broyting. Hetta má ikki skundast ígjøgnum, tí tað kann undirgrava legitimitetin og oyðileggja viðgerðina, sigur Heini í Skorini.